# Loysing inn gjøgnum bakdyrnar?

EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður



**Ongin kennir avleiðingarnar av uppskotinum til nýggja stýrisskipan, men líkt er til, at loysingin í hesum døgum verður lirkað ígjøgnum bakdyrnar í Løgtinginum. Fjøldin av føroyingum fær onki at vita, og miðlarnir hava higartil víst málinum lítlan áhuga, hóast tað kann fáa ovurstóra ávirkan á okkum øll**

Skulu føroyingar vakna við kaldan dreym um nakrar fáar vikur, tá Føroyar eru nøkur fá fet frá at loysa frá hinum partinum av Ríkinum?

Hetta er stóri spurningurin, nú formansskapurin í Løgtinginum fyri fáum døgum síðani framdi grundlógarbrot og trýsti eitt ólógligt uppskot um føroyska stjórnarskipan fyri Løgtingið.

Hetta hendi væl at merkja, uttan at føroyingar flest fingu nakað at vita um málið. Fjølmiðlarnir sýndu málinum lítlan áhuga, hóast tað kann fáa ovurstóra ávirkan á okkum øll.

**Grundlógin er brotin**

Tað, sum í stuttum hendi í Løgtinginum í farnu viku er, at innanhýsis løgfrøðingarnir og stjórin á Løgtingsskrivstovuni gjørdu vart við ein sera álvarsligan trupulleika: at eitt lógaruppskot um nýggja stýrisskipan brýtur við landsins Grundlóg og yvirskipaðu reglur í Stýrisskipanini, Heimastýrislógini og Tingsskipanini.

Løgfrøðingarnir mæltu tí til, at formansskapurin mælti Tinginum til, at vísa uppskotinum burtur.

Hetta valdi formansskapurin at ignorera. Hann valdi tí tilvitað at bróta Grundlógina og hinar yvirskipaðu lógirnar í Føroyum við at trýsta lógaruppskotið fyri Løgtingið kortini.

Hesin framferðarháttur er óhoyrdur og hoyrir ikki heima í nøkrum demokratiskum tjóðartingi!

Reglur, sum eru ætlaðar at vera ein trygd hjá borgarum í hesum landi, verða uttan himpr settar til viks – uttan at nakar talar at..

Føroyar kunnu sum demokratiskt land og rættarsamfelag ikki standa modell til slíka framferð.

Hvar eru tit í fjølmiðlunum, ið siga tykkum vera vakthundur hjá fólkaræðinum?

Hví taka tit ikki málið upp, seta kritisku spurningarnar, greiða borgarum frá og perspektivera hetta? Er tað ikki tykkara fornemmasta uppgáva?

**Loysing inn gjøgnum bakdyrnar**

Eftir mínum tykki verður tað, sum Fullveldissamgongan ikki kláraði í samráðingunum við donsku stjórnina í ár 2000, nú lumpað inn í Løgtingið av einum fullveldis-løgtingsformanni.

Hetta er loysing inn gjøgnum bakdyrnar, og tað er av fleiri orsøkum, m.a.:

- Bæði lógartekniskt og í innihaldi brýtur uppskotið við Grundlógina, Stýrisskipanina, Heimastýrislógina og Tingskipanina
- Ongin veit, hvørja juridiska tign og vekt nýggja lógin er ætlað at hava í mun til Grundlóg, Stýrisskipan og Heimastýrislóg
- Ongin veit, hvussu lógin skal fatast ella tulkast, um uppskotið verður samtykt
- Ongin kennir avleiðingarnar av uppskotinum
- Nýggja lógin er ætlað at koma í gildið eftir eina einstaka samtykt í Løgtinginum og fólkaatkvøðu. Galdandi reglur siga annars, at tvey løgting (við vali ímillum) skulu samtykkja slíka lóg í óbroytt-um líkið

Tað er eitt stórt mistak, at Sambandsflokkurin hevur lovað hesum uppskotinum ígjøgnum. Ein tingmaður úr Sambandsflokkinum hevur í formansskapinum mælt ímóti, men tað hjálpir lítið.

**Sannleikin má fram**

Allar alarmklokkur eiga at ringja, og øll ávaringarljós eiga at blunka.

Løgtingið eigur í minsta lagi at vísa uppskotinum frá sær, til tað lýkur krøvini, ið løgfrøðingarnir hjá Løgtinginum seta.

Serfrøðingar í statsrætti og fólkarætti mugu á banan at greina, hvat vendir upp og niður í málinum.

Hvussu stendur henda nýggja lóg í mun til Grundlóg, verandi Stýrisskipan og Heimastýrislógina? Tað mugu vit vita.

Vit mugu vita púra greitt, hvørjar avleiðingar uppskotið fær.

Landsstýrið og Ríkisstjórnin eiga at hava felags forstáilsi fyri, at nýggja stjórnarskipanin er í lagi og verður sett í gildi.

Miðlarnir eiga at lýsa málið – objektivt og við egnum kanningum – ikki bert við at spyrja hendan ella handan politikaran.

Og borgarar eiga at fáa sannleikan at vita.

**Klappa í sínar smáu hendur**

Men hvat hendir í løtuni? Jú, vit tralla spakuliga víðari. Fylgja við høpisleysum samráðngum um fíggjarlógina og síggja X-faktor í sjónvarpinum.

Alt ímeðan Tjóðveldi og fullveldisfólk í tí dulda klappa í sínar smáu hendur.

Í løtuni bendir nevniliga nógv á, at tey kunnu vinna sær fullveldi í Føroyum.

Málið er lirkað spakuliga inn gjøgnum bakdyrnar í Løgtinginum, uttan at nakar úti í samfelagnum letst um vón.

# Páskastevnan hjá Oasuni

TÍÐINDASKRIV
*Oasan*

Eins og undanfarin ár skipar FRÍKIRKJAN OASAN fyri stórari páskastevnu. Sum tað sæst av skránni á síðu 2, verða - umframt okkara egnu leikfólk - gestatalararnir Stephan og Anne Christiansen úr Noregi.

Tey koma at tala á kvøldmøtunum skírishósdag, langa fríggjadag, páskaaftan og páskadag kl. 19, umframt eisini á ungdómstiltakinum kl. 2230 langafríggjadag. Hetta er aðru ferð, tey koma til Føroya í samband við páskastevnu. Tey vóru høvuðstalarar í Kelduni á páskastevnuni í 2007.

Stephan Christiansen er norskur kristniboðari. Hann er 39 ára gamal og vaksin upp í Tønsberg og Horten og er giftur við Anne Christiansen. Frá ungum árum av hevði hann eina visión um at boða evangeliið til ungdómin.

Og avleiðingin av hesum bleiv so stovnanin av næminga- og studentafelagsskapinum Ny Generasjon, sum í 1993 byrjaði sum eitt bønar- og evangeliseringsarbeiði millum studentar á universitetinum í Oslo. Hetta tiltakið er eitt tvørkristiligt næminga – og studentaarbeiði, ið hevur til endamáls, at næmingar og studentar skulu boða evangeliið á øllum skúlum og læriplássum í Noregi. I 1998 bleiv Ny Generasjon stovnað i Danmark, og í 1999 í Íslandi, og er nú annars í mongum øðrum londum. Hjúnini bæði hava eisini verið við til at stovna felagsskapin Jesus Revolution, ið er ein kristin ungdómsrørsla, sum byrjaði í Noregi í 1997, og hevur sum endamál at boða evangeliið um Jesus til europeiska ungdómin.

Anne Christiansen byrjaði JesusKvinnur í 2003 undir eini stevnu í Oslo. Saman við manni sínum er hon leiðari í JesusChurch í Oslo, og reka tey eisini trúboðaraarbeiðið "Jesus-Revolution", eins og tey eisini stovnaðu næminga- og studentafelagsskapin "Ny Generasjon".

Málið við JesusKvinnum, sambært Anne, er at kvinnur úr ymsum trúarrørslum skulu standa saman til tess at byggja Guds ríki og styrkja tey kristnu virðini í landinum. Tá ið vit standa saman, hava vit positiva ávirkan. Vit halda, at tað er sera umráðandi at eggja kvinnum at brúka heim síni sum eitt vælegnað bønarstað, og eisini lata heim síni upp sum eina oasu hjá grannum og vinum, sigur hon.

JesusKvinnur hava nú stevnur kring alt Noreg fyri at eggja kvinnum til at tæna, har tær eru í dagligdegnum. Arbeiðið miðar eftir at savna ættarliðini, og er hesin felagsskapur tvørkirkjuligur. Á tann hátt er møguligt at fáa íblástur hvør frá øðrum og standa saman í týdningarmiklum tíðum.

Jesus hevur leiðir, nýmótans kvinnur kunnu ganga, so vit ikki missa tað, ið undanfarin ættarlið hava bygt upp.

Á heysti 2005 vitjaði Anne Christiansen í Føroyum, tá hon skipaði fyri einari JesusKvinnustevnu í Oasuni.

**Vælkomin í Oasuna.**

